STRANDFARASKIP
LANDSINS

# Vegleiðing til ferðandi í samband við skerda busskoyring við Bygdaleiðum

**Tilkall:**

Hevur tú tørv á flutningi, nú Bygdaleiðir byrja at koyra eftir skerdari ferðaætlan skipa við tilkall, skalt tú boða frá **<u>í seinasta lagi klokkan 19:00 dagin fyri</u>**, og upplýsina fylgjandi:

- Navn og telefonnummar
- Leiðnummar, tíð og hvar tú ynskir at koyra frá og til

<u>TILKALL</u> nr. er **216868** á LEIÐUNUM **<u>100</u>**, **<u>300</u>**, **<u>400</u>** og **<u>500</u>**
<u>TILKALL</u> nr. er **225900** á LEIÐINI **<u>600</u>**
<u>TILKALL</u> nr. er **212324** á LEIÐUNUM **<u>700</u>** og **<u>701</u>**

**Áheitan frá SSL:**

Coronavirusið (Covid-19) ger, at øll mugu vera varin í samband við ferðing, tískil mælir SSL til:

- **Ferðast ikki við Bygdaleiðum, um tú ert sjúk/ur ella hevur illgruna um sjúku**
  Verið varug við sjúkueyðkenni, ið kunnu benda á Coronavirus, t.d. hosta og fepur, og verð heima, um tú merkir tær okkurt.

- **Ferðast bara, um tað er alneyðugt**
  Um møguligt umhugsa t.d. at flyta allar avtalur, møta fyrr/seinni til arbeiðis ella keyp inn til fleiri dagar. Vís serligt umhugsni, um tú ert komin til Føroyar 12. mars ella seinni og skal í heimauppihald.

- **Vís umhugsni mótvegis bussførara og øðrum ferðandi**
  Minka um smittuvanda við at fylgja øllum tilmælum frá almennu myndugleikunum, sí <u>www.corona.fo</u>
  Fyribils er ongin ferðaseðla avgreiðsla. Ferðandi skulu brúka hurðina í aftara enda á bussinum og fylgja talmerkingum á setrinum.
  Skalt tú hosta ella njósa, ger tað í ermuna ella eitt einnýtis lummaturriklæði – **<u>ikki í hendurnar</u>**. Verð serliga varug/ur við ikki at hosta ella njósa tætt uppá onnur fólk. Nert minst møguligt við bussin innan. Umráðandi er at virða øll skelti og vegleiðingar frá bussførara.
  Ferðandi skulu halda 2 metrar frástøðu frá øðrum ferðandi og 3 metrar frástøðu frá bussførara.

- **Minst til gott hondreinføri**
  Sóttreinsa hendur, áðrenn farið verður í bussin. Gott og neyvt hondreinføri er týðandi smittuverja í mun til Covid-19.

- **Gakk ella súkkla**
  Um møguligt, umhugsa at ganga ella súkkla á stuttum túrum.